Álit

í

løgtingsmáli nr. 18/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn
(Bústaðir fíggja bústaðabygging uttanfyri størru býirnar)

Kristina Háfoss, Sirið Stenberg, Høgni Hoydal, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, løgtingsmenn, hava vegna Tjóðveldi lagt uppskotið fram 9. september 2020, og eftir 1. viðgerð 15. september 2020 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. september og 8. oktober 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Felagið Peningastovnar, Bústaðir, Útoyggjafelagið og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Rósa Samuelsen, Erhard Joensen og Jóhan Eli Poulsen) tekur ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) mælir Løgtinginum til at taka undir við uppskotinum við hesum viðmerkingum.

Tað skal vera møguligt at byggja egnan bústað kring alt landið. Hetta er ikki støðan í dag, tí lánitreytirnar eru ymiskar í størru býunum, í mun til uttanfyri størru býirnar. Hetta vilja vit loysa. Felagið Bústaðir er bústaðarpolitiska amboð landsins, og kann átaka sær uppgávuna at vera við til at loysa avbjóðingina, og tryggja eitt fjøltáttað bústaðarmynstur kring alt landið.

Uppskotssetararnir vísa í uppskotinum á, at orsøkin til støðuna er, at marknaðarvirðið uttanfyri størru býirnar ofta er væl lægri enn kostnaðurin av at byggja húsini, og fíggingin er treytað av marknaðarvirðinum. Víst verður á dømi um, at persónar, ið hava fingið noktað fígging til at byggja hús á bygd, hava fingið játtað eitt uppaftur hægri lán til ein bústað í Tórshavn. Dømið vísir, at tað ikki eru gjaldevnini hjá teimum, sum skulu byggja, ið eru forðingin, men heldur verandi lóg um fíggjarligt virksemi, sum bankarnir eru noyddir at halda.

Minnilutin vísir á, at verða politisk átøk ikki gjørd fyri at tryggja fólki møguleikan at byggja kring alt landið, fara vit at síggja mun á bústøðunum í og uttan fyri miðstaðarøkið. Meðan nýggir bústaðir verða at síggja í miðstaðarøkinum, verða tað serliga eldri bústaðir uttan fyri miðstaðarøkið. Henda skeivleika ynskir minnilutin at fyribyrgja. Henda gongd kann vera við til at miðsavna húsabyggingina í Føroyum til miðstaðarøkið. Hetta kann vera við til at trýsta prísirnar upp og harvið kunnu verandi bústaðartrupulleikar gerast enn størri.

Hoyringarnar í nevndini hava víst á, at trupulleikarnir við at fáa lán á smáplássum og útoyggjum eru veruligir. Fyri nøkur av økjunum eru avleiðingarnar sera álvarsamar. Fólkaminking kann vera ein avleiðing umframt, at tað eru tekin um, at múgvandi fólk, sum ikki eru fastbúgvandi á staðnum, kunnu útvega sær bústað á somu plássum, sum fastbúgvandi fólki ikki kann. Bygdirnar kunnu tá gerast feriu- og frítíðarpláss meira enn heimstaður hjá fastbúgvandi fólki. Ikki skilt soleiðis, at

summarhús ikki kunnu vera eitt gevandi íkast til útjaðaran, tí tað eru tey. Men trupulleikin hjá fastbúgavndi fólki við at seta búgv er eyðsyndur og má loysast.

Við hesum uppskoti fáa Bústaðir heimild til at bjóða eitt lán, ið fevnir um tann partin av láninum, ið bankin ikki kann bjóða, tó ongantíð meira enn upp til 100 % av metingarvirðinum.

Minnilutin heldur, at tað skal vera møguligt at byggja egnan bústað kring alt landið, so fólk fáa frælsi til at velja egnan bústað – um tey vilja leiga, keypa ella byggja. Hetta eigur at vera treytað av, at gjaldevnini hjá teimum, sum skulu byggja, annars eru í lagi, sum uppskotið eisini leggur upp til.

Í sambandi við, at tað í lógaruppskotinum verður skrivað fígging av bústøðum uttanfyri størru býirnar, vil minnilutin gera vart við, at tað eisini kunnu vera størri býir kring landið, har trupult er at fáa fígging. Hetta kann til dømis vera Tvøroyri, sum er ein stórur býur, men har eftirspurningurin eftir bústøðum er lutfalsliga lítil og við tí eisini møguleikin fyri at fáa fígging til bygging av nýggjum bústaði. Minnilutin vísir tí á, at endamálið við uppskotinum er at veita heimild til fígging av bústøðum, har bankarnir annars ikki vilja fíggja, orsakað av marknaðarvirðinum í mun til byggikostnað.

Sama lógaruppskot bleiv lagt fram fyri einum ári síðan. Tá mæltu samgonguumboðini til at fella uppskotið og at bíða, til landsstýrismaðurin kom í Løgtingið við bústaðarpakkanum, sum skuldi taka hædd fyri hesum tørvi eisini. Nú eitt ár seinni bíða við enn eftir bústaðarpakkanum, og búðstaðarneyðin er enn líka stór. Tí er ongin orsøk at drála longur, men at samtykkja hetta uppskot, soleiðis at gongd kann koma á bústaðarbyggingina kring alt landið har mong bíða eftir møguleikanum at seta føtur undir egið borð.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin til, at Løgtingið samtykkir uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 29. oktober 2020

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Aksel V. Johannesen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Jóhan Eli Poulsen

Erhard Joensen